# Tám

## Jón Thorsteinsson, 2022

https://nam.mitcfu.fo/CFUFH1690046495




**Lýsing:**

Anja flytur aftur til Føroya við soni sínum, og tey royna at fóta sær á bústaðarmarknaðinum í høvuðsstaðnum. Seinni vísir tað seg, at vandar liggja og lúra. Teir hótta tann nýggja kærleikan í hesi søguni um broytingar, strembanir og brotsgerðir.

**Lærugrein og stig:**

Føroyskt á A-stigi (1. ella 2. árið). Við smáum tillagingum kann tilfarið eisini brúkast á C-stigi og í hádeild fólkaskúlans.

**Faklig øki**

Við hesum tilfarinum kunnu næmingarnir menna førleikarnar at greina og tulka skaldsøgu og at seta í frásjón. Somuleiðis menna tey førleikarnar at grundgeva, skriva ymisk tekstsløg og at skapa margháttaðan tekst.

**Tilfar:**

Arbeitt verður við skaldsøguni *Tám* (342 s.). Harafturat eru leinki til ymiskt annað tilfar.

**Arbeiðshættir:**

Floksundirvísing, bólkaarbeiði og einsæris arbeiði.

**Tíð:**

8-9 blokkar á 90 min.

© Nám 2023

**Byrja at lesa (1 blokkur)**

**Fyrireiking heima:**

Les tekstirnar:

- Eyðun Klakstein: “Eg ivaðist í um eg fór at koma á mál”, *Sosialurin*, 16.12.2022.
- Arnbjørn Ó. Dalsgarð: “Kám nútíðarskaldsøga við eyðsýndum dygdum”, *Sosialurin*, 6.1.2023.

Tit skulu í smáum bólkum gjøgnumganga tekstirnar, sum tit hava lisið heima, og skifta orð um innihaldið.

Hyggið síðan eftir permuni á bókini, lesið tekstin á baksíðuni og hugsið um heitið *Tám*. Tosið saman um, hvørjar væntanir tit hava av bókini.

Síðan byrja tit at lesa skaldsøguna *Tám* í flokkinum og lesa so restina hvør sær heima. Í flokkinum kunnu tit antin lesa hvør sær ella saman í smáum bólkum. Meðan tit lesa, skulu tit serliga leggja merki til ávís viðurskifti. Skrivið síðutøl niður og finnið nøkur áhugaverd sitat.

Vel tvey av viðurskiftunum niðanfyri at leggja serliga til merkis:

- Fótbóltur og onnur spøl
- Veður og árstíðir
- Pátrúgv
- Bústaðarviðurskifti og bygging
- Møblar, innbúgv og list
- Tilsipingar til Bíbliuna

---

**Orðaskifti og bólkaarbeiði (1 blokkur)**

**Fyrireiking heima:**

Les skaldsøguna *Tám* lidna og skriva síðutøl og áhugaverd sitat um tvey av viðurskiftunum at leggja serliga merki til.

Fyrra helvt av blokkinum er orðaskifti í bólkum. Tit skulu í smáum bólkum tosa saman um skaldsøguna. Tit kunnu m.a. tosa um hesar spurningar:

- Hvat dámdi tykkum skaldsøguna
- Lýsir hon viðkomandi evni?
- Er hon realistisk?

- Hvat halda tit um viðurskiftini, sum tit vórðu biðin um serliga at leggja til merkis?
- Eru tit samd/ósamd við ummælinum hjá Arnbirni Dalsgarð?

Veljið síðan eitt brot (uml. 5-10 reglur), sum tit halda vera serliga áhugavert, at lesa upp fyri flokkinum.

Tosið síðan saman í flokkinum um ymsu brotini, sum bólkarnir hava valt.

Í seinnu helvt av blokkinum skulu tit skipa tykkum í bólkar og byrja at arbeiða við uppgávunum niðanfyri.

---

**Greina og tulka (2 blokkar)**

Bólkaarbeiði. Hvør bólkur arbeiðir við eini av uppgávunum niðanfyri og leggur fram fyri flokkinum. Framløgutilfarið skal verða tøkt hjá øllum næmingunum.

**Uppgáva 1) Bygnaður**

Setið skaldsøguna inn í frásagnarfrymilin og greiðið stutt frá, hvat hendir í skaldsøguni fyri hvønn partin í frásagnarfrymlinum. Lesið meira um frásagnarfrymilin í *Sýni & Dýpi 1*.

Nøkur av viðurskiftunum, sum tit vórðu biðin um at leggja serliga til merkis, hava týdning fyri bygnaðin. Hvørji? Og á hvønn hátt?

**Uppgáva 2) Persónlýsingar – Anja, Dánjal og mamma Anju**

Lýsið persónarnar Anju, Dánjal og mammu Anju og vísið á, hvønn leiklut persónarnir hava í skaldsøguni. Vísið á síðutøl og sitat úr skaldsøguni.

Á hvønn hátt broytast persónarnir, sum skaldsøgan fer fram?

Setið persónarnir í frymilin heima – úti – heim og lýsið persónarnar fyri hvønn partinum í frymlinum.

Lesið meira um frymilin heima – úti - heim í *Sýni & Dýpi 1*.

**Uppgáva 3) Persónlýsingar – Bartal, Sigtór og Jacek**

Lýsið persónarnar Bartal, Sigtór og Jacek og vísið á, hvønn leiklut persónarnir hava í skaldsøguni. Vísið á síðutøl og sitat úr skaldsøguni.

Á hvønn hátt broytast persónarnir, sum skaldsøgan fer fram?

Setið persónarnir í frymilin heima – úti – heim og lýsið persónarnar fyri hvønn partinum í frymlinum.

Lesið meira um frymilin heima – úti - heim í *Sýni & Dýpi 1*.

© Nám 2023

**Uppgáva 4) Frásagnarviðurskifti**

Lesið um frásøgufólk og sjónarhorn í *Sýni & Dýpi 1*.

Lýsið frásøgufólk og sjónarhorn í ymsu pørtunum í skaldsøguni. Hvørjar persónar skiftir sjónarhornið millum? Vísið á dømi.

Hyggið nærri at 9. og 14. parti. Hvussu eru frásagnarviðurskiftini í hesum pørtunum? Hví munnu hesir partarnir hava øðrvísi frásagnarviðurskifti enn hinir partarnir?

Hvønn týdning meta tit, at skiftandi sjónarhornini hava fyri lesaraupplivingina?

**Uppgáva 5) Skrivingarlag og myndamál**

Greiðið frá skrivingarlagnum og vísið á dømi um málsligan stíl. Er málsligi stílurin høgur/lágur, og er málið háfloygt/gerandisligt?

Viðgerið eisini nýtslu av myndamáli í skaldsøguni. Havið nøkur av viðurskiftunum, tit vórðu biðin um at leggja serliga til merkis, í huga. Hvussu kunnu hesi skiljast í fluttari merking? Vísið á dømi.

Metið um, hvussu nýtsla av myndamáli ávirkar frásøgnina og lesaran.

---

**Seta í frásjón (2 blokkar)**

**Fyrireiking heima:**

Lesið, hyggið ella lurtið eftir tilfarinum niðanfyri, sum er viðkomandi fyri tykkara uppgávu:

- Kringvarp Føroya: ”Rúsevnisumhvørvið er nógv harðari í dag”, *Dagur og vika*, 30.03.2023.
- Kringvarp Føroya: ”Ungar kvinnur selja sín kropp” (frá 5:50 til 16:40), *Dagur og vika*, 11.06.2020.
- Kringvarp Føroya: ”Heimleysur: Eingin hjálp at heinta”, *Dagur og vika*, 02.06.2020.
- Kringvarp Føroya: ”Sólmai er heimleys”, *Dagur og vika*, 04.12.2018.
- Kringvarp Føroya: ”Fyrst var eg kedd, so ill, og so kedd aftur”, *Góðan morgun Føroyar*, 19.05.2022.
- Fólkaheilsuráðið: ”Mynd krevur samtykki”, 2017.
- Bíblian: Jósvabók, kap. 1 og kap. 6-11.
- Bíblian: Seinna Kongabók, kap. 5, vers 1-15.
- Eyðun Andreassen: “Pátrúgv” (s. 56-61), *Úr søgu og søgn*, 1986.

Bólkaarbeiði. Hvør bólkur arbeiðir við eini av uppgávunum niðanfyri og leggur fram fyri flokkinum. Framløgutilfarið skal verða tøkt hjá øllum næmingunum.

**Uppgáva 1) Rúsevniskriminalitetur**

Greiðið frá, hvussu skaldsøgan viðger temað rúsevniskriminalitetur. Vísið á nøkur dømi í skaldsøguni. Samanberið síðan við brotini "Rúsevnisumhvørvið er nógv harðari í dag" og "Ungar kvinnur selja sín kropp" og metið um, hvussu væl skaldsøgan samsvarar veruleikanum viðvíkjandi rúsevniskriminaliteti.

**Uppgáva 2) Bústaðartrot**

Greiðið frá, hvussu skaldsøgan viðger temað bústaðartrot. Vísið á nøkur dømi í skaldsøguni. Samanberið síðan við brotini "Heimleysur: Eingin hjálp at heinta" og "Sólmai er heimleys" og metið um, hvussu væl skaldsøgan samsvarar við veruleikanum viðvíkjandi bústaðartrot.

**Uppgáva 3) Ærumeiðing og vantandi samtykki**

Greiðið frá, hvussu skaldsøgan viðger temað ærumeiðing og vantandi samtykki. Vísið á dømi í skaldsøguni. Samanberið síðan við brotið "Fyrst var eg kedd, so ill, so kedd aftur" og lýsingina "Mynd krevur samtykki" og metið um, hvussu væl skaldsøgan samsvarar veruleikanum viðvíkjandi ærumeiðing og vantandi samtykki.

**Uppgáva 4) Bíblian**

Sigtór vísir í pørtunum 13, 33 og 35 til tekstir úr Bíbliuni. Lýsið Sigtór og støðu hansara í hesum pørtum. Lesið eisini tekstirnar úr Jósvabók og Seinnu Kongabók og greiðið frá innihaldinum. Metið um, hví høvundurin velur at nýta hesar tekstir í frásøgnini, og hvørja ávirkan tað hevur á lesararnar. Finnið dømi um aðrar tekstir, sum eisini hava tilsipingar til Bíbliuna.

**Uppgáva 5) Pátrúgv**

Mamma Anju ger og sigur ymiskt, sum vísir pátrúgv. Lesið tekstin "Pátrúgv" og greiðið frá um pátrúgv. Lýsið mammu Anju viðvíkjandi pátrúgv og vísið á nøkur dømi um pátrúgv í skaldsøguni. Metið um, hví høvundurin velur at nýta pátrúgv í frásøgnini, og hvørja ávirkan tað hevur á lesararnar. Finnið dømi um aðrar tekstir, sum eisini hava tilsipingar til pátrúgv.

---

**Ymsar uppgávur (1-2 blokkar ella heimaarbeiði)**

Ymsar uppgávur at arbeiða við einsæris ella í smáum bólkum.

**Uppgáva 1) Skift sjónarhorn - Sigtór**

Les part 20, sum er skrivaður úr sjónarhorninum hjá Bartali. Lýs partin úr sjónarhorninum hjá Sigtóri. Legg serliga dent á at lýsa brotið frá niðast á s. 161 til s. 164.

© Nám 2023

**Uppgáva 2) Skift sjónarhorn - Dánjal**

Les part 27, sum er skrivaður úr sjónarhorninum hjá Anju. Lýs partin úr sjónarhorninum hjá Dánjali. Legg serliga dent á at lýsa brotið frá mitt á s. 229 til s. 233.

**Uppgáva 3) Yrking**

Skriva eina kærleiksyrking við støði í parti 14, sum er um, tá Anja og Bartal fyrstu ferð eru úti og eta saman. Tú kanst velja, um yrkingin lýsir kenslurnar hjá Anju, Bartali ella hjá báðum. Hav sjónarmynd, ljóðmynd og skaldsligar myndir í huga, meðan tú skrivar. Les meira um skaldskap í bundnum máli í *Sýni & Dýpi 1*.

**Uppgáva 4) Tíðindi**

Ger tíðindi um rættarmálið, har tit eisini greiða frá fyritøkuni hjá Sigtóri og Bartali. Tit kunnu velja, hvat tekstslag tit gera, t.d. blaðgrein, poddvarp ella sjónvarpstíðindi. Les meira um tíðindi og tíðindagreining í *Sýni & Dýpi 2*.

**Uppgáva 5) Pallborðskjak**

Við íblástri frá parti 5 í skaldsøguni skulu tit skipa eitt kjak um bústaðarmarknaðin í Føroyum, sæð frá ávikavist leigarum (Anju og mammu hennara) og útleigarum (Símun og konuni).

Finnið í bólkum nakrar grundgevingar og vísið á, hvat slag av grundgevingum, talan er um, og hvussu hesar eru bygdar upp. Lesið um grundgevingar í *Sýni & Dýpi 1*.

Gerið síðan eitt pallborðskjak um bústaðarmarknaðin, og nýtið grundgevingar frá bólkaarbeiðinum. Tosið síðan saman í bólkum um, hvussu grundgevingarnar eru bygdar upp og skipaðar.

© Nám 2023